# Summarfestivalurin víðkar økið og økir atgongumerkjatalið

**Nú sleppa ikki bert 5000, men heili 7000 fólk á Summar Festivalin í Klaksvík. Og sjálvt festivaløkið verður nú eisini víðkað og røkkur heilt niðan undir fótbóltsvøllin. Øll tey 5000 upprunaligu atgongumerkini eru seld, men við víðkingini eru nú eini 1500 atgongumerkir eftir**

SUMMARFESTIVALUR
*Dagfinn olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Stóri áhugin fyri Summar Festivalinum hevur fingið fyrireikarar og myndugleikar í Klaksvík at taka saman tøk, so festivalurin nú verður víðkaður.

Økið verður víðkað og nú ber aftur til at fáa atgongumerkir til festivalin, sum annars hevur verið útseldur. Markið var 5000 fólk. Komið var uppá eini 5500 fólk við hjálparfólkum og øðrum, men við víðkingini sleppa nú 7000 fólk á Summar Festivalin og tí eru nú aftur eini 1500 atgongumerki tøk. Hesi verða seld í forsølu til og við fríggjadegnum og annars við dyrnar.

## Dupult so stórur

Við víðkingini verður festivalurin dupult so stórur, sum í fjør, tá eini 4000 fólk leitaðu sær til Klaksvíkar. Festivaløkið røkkur nú heilt niðan undir fótbóltskýlið. Har verður eisini reist eitt 1000 fermetra stórt tjald, har sonevndi Flags-pallurin verður. Hesin er ein av trimum pallum. Hinir eru Silva pallurin og Stóri Pallurin.

Klaksvíkar Kommuna hevur tikið sær væl av Vágsbø og økinum annars, har festivalurin skal haldast, og hetta fegnast fyrireikararnir um.

- Vit hava roynt at funnið eina loysn, nú áhugin fyri festivalinum er so stórur, og nú er so funnið fram til eina góða loysn, metir Steintór Rasmussen, fyrireikari.



*Fyrireikarar og myndugleikar hava tikið stig til at víðkað Summar Festivalin, so rúm nú er fyri 7000 fólkum á festivalinum, mótvegis teimum 5000 frammanundan. Steintór Rasmussen, fyrireikari, Hans Djurhuus, sýðslumaður og borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen fegnaðust mikudagin um, at teir í felag hava megnað at loysa trupulleikan*

Og eisini borgarstjórin í Klaksvík fegnast.

Summarfestivalurin er eitt spennandi tiltak fyri Klaksvíkina og setir Klaksvíkina á heimskortið. Vit vilja gera alt fyri, at býurin er klárur til festivalin og at festivaløkið er klárt, stórt og gott, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri.

Mikudagin hittust fyrireikarar, borgarstjóri og løgreglan umboðandi myndugleikarnar, mitt í Klaksvík og kundu teir fegnast teir um, at teir í felag hava funnið eina loysn, so Summar Festivalurin nú kann loyva 2000 fólkum afturat á festivalin og harvið nøkta tann stóra eftirspurning, ið hevur verið eftir atgongumerkjum.


## TEKNISKUR SØLURÁÐGEVI

Til teknisku deild okkara verður søkt eftir søluráðgeva

*Royndir okkara tey seinastu 60 árini, hava gjørt okkum til ein tann størsta HVS heildarveitara í Føroyum. Vit bjóða fram heildarloysnir innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk og baðirúmsmøblar*

**Tað setur krøv til starvsfólkið**

Tú kemur at ráðgeva kundum okkara og hjálpa teimum at finna tað røttu loysnina. Tú kemur at rokna út tilboð, og verða við til at fyrireika størri verkætlanir og fylgja teimum í verki.

Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan á at menna fyritøkuna. Tú kemur soleiðis, í samstarvi við onnur, at virka á einum spennandi og fjøltáttaðum arbeiðsplássi.

**Tað er ein fyrimunur um tú**

- Hevur røttu útbúgving og/ella drúgvar royndir
- Hevur royndir innan vhs, ventilation ella líknandi
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi, nærlagdur, íðin, og kreativur
- Skilur týdningin av at góðum handverki, dygd og góðari kundarøkt

**Afturfyri bjóða vit**

- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag
- Løn, í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt, eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning




Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða innkomin seinast 15. august til p/f Maria Poulsen, Boks 182, Smyrilsvegur 8, FO-110 Tórshavn.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000 og tosa við Kristian á Dul, stjóra.

**Maria Poulsen pf**

Smyrilsvegur 8 · 100 Tórshavn · Tel 31 20 00 · www.mariapoulsen.fo

Sosialurin 341800